# Ellivu ókendir yrkjarar í Miðlahúsinum

**Hóskvøldið klokkan átta, verður eitt forkunnugt tiltak í Miðlahúsinum, tá 12 yrkjarar, sum ongantíð hava útgivið nakað, fara at lesa upp egnar yrkingar**

YRKING

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað eru Elin á Rógvu og Kjartan Hansen, sum eru stigtakarar til tiltakið sum verður í Miðlahúsinum í annaðkvøld. Á skránni verður yrkingar og tónleikur. Yrkingar hjá 11 yrkjarum verða lisnar verða lisnar upp, og Búi Dam fer at spæla tónleik inn í millum.



*Tað eru Elin á Rógvu og Kjartan Hansen, sum hava tikið stig til tiltakið (mynd Rólant Waag Dam)*

### Skápsyrkjarar

Elin á Rógvu yrkir ikki sjálv, men hon metir at okkurt má henda á hesum økinum. - Tað byrjaði við, at Kjartan vísti mær eina yrking hann hevði gjørt. Vit prátaðu so aftur og fram um hana, og um at yrkja. Niðurstøðan vit komu fram til var, at tað helst er ein rúgva av fólkum sum yrkja fyri seg sjálvi, men ongantíð vísa tær fyri øðrum ella lesa tær upp. Tí hildu vit, at tað kundi verið stuttligt at savna nøkur heilt tilvildarlig fólk, sum tó hava tann felagsnevnara, at tey yrkja, men ikki hava givið nakað út. Skápsyrkjarar, kunnu vit kalla tað, heldur Elin skemtandi fyri.

Elin og Kjartan søgdu sínum vinfólkum frá um hugskotið. Tey søgdu tað síðani víðari til síni vinfólk, sum søgdu tað víðari. Soleiðis hevur tað eydnast teimum at fáa 11 yrkjarar millum 17 og 35 ár, at lesa og fáa sínar yrkingar lisnar upp í Miðlahúsinum í annaðkvøld.

Millum tey 11, sum fara at lesa upp, eru fleiri, sum lesa egnar yrkingar. Men so er tað onkur sum er burturstaddur og ikki fáa lisið upp sjálvi, men gjarna vilja hava sínar yrkingar lisnar upp. Til tað hava tey millum annað fingið Sólvu Jónsdóttir, Thomas Koba og Øssur Winthereig.

### Hoyra hvønn annan

Høvuðsorsøkin til tiltakið er tann, at Elin og Kjartan halda, at tað átti at verið áhugavert hjá yrkjarunum at hoyra hvønn annan. Og ikki minst at lesa sínar yrkingar upp fyri øðrum, tí yrkingar eru jú nakað heilt persónligt nakað, vísir Elin á Rógvu á. - Hjá nógvum er tað eitt ógvuliga stórt stig at taka, at lesa sínar yrkingar upp, men hetta er ein góður møguleiki fyri at vera hoyrdur og hoyra onnur, sigur ein av fyriskiparunum.

### Tónleikur og málningar

Stigtakararnir Elin og Kjartan eru greið yvir, at tað kann gerast tungt at lurta eftir yrkingum eitt heilt kvøld. Tí hava tey sett eitt hámark, sum sigur tríggjar yrkingar í part. Og fyri at yrkingarnar kunnu sodna eina løtu, og ikki alt skal svølgjast í einum, hava tey fingið Búa Dam at spæla inn í millum.

Eisini hava tvær damur gjørt vart við seg hjá Elini og Kjartani og spurt, um tær ikki kunnu sleppa at hava hvør sín málning hangandi meðan tiltakið er.

Aftrat teimum 11 yrkjarunum og Búa Dam, hava tey fingið Petur Pólson inn, sum gestalesara. Hann fer at lesa egnar yrkingar upp, og er einasti av luttakarunum, sum hevur útgivið yrkingar áður.

Fyriskipararnir vóna at fólk vísa tiltakinum áhuga, og ongantíð betur, um onkur av teimum etableraðu yrkjarunum eisini er millu áhoyrararnar, tí hvør veit, um teir ikki eisini kundu fingið íblástur frá hesum tungu og óspiltu yrkjarunum.

## Sleppur ikki at koyra aftur fyri arbeiðspássið

RÚSDREKKAKOYRING

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Ein fullur bilførari var sekund frá at renna ein pápa og tvíburar hansara niður, tá hann við vitleysari koyring fór buldrandi upp á gongubreytina og inn í ein grótgarð tætt við Hvíldarheimið við Gundadalsvegin. Pápin var lukkutíð so mikið kvikur, at hann megnaði at renna út á vegin við barnavogninum við tvíburunum í, og syrgdi tí fyri, at tað sum lættliga kundi enda við einum sorgarleiki, tíbetur spældi væl av.

### Sleppur ikki at koyra aftur

Bilurin, sum hevur fingið stóran skaða, og helst verður dømdur vrak, vísir seg nú at hoyra til eina byggifyritøku í Havn. Stjórin av fyritøkuni visti í morgun at siga, at viðkomandi, sum koyrdi bilin sunnudagin, ongantíð kemur at koyra bil í teirra fyritøku aftur, men at hann ikki hevur mist starvið.

Málið er meldað til løgregluna, og av løgreglustøðini siga tey, at førarin kann síggja fram til at missa koyrikortið, fáa eina bót og møguliga ein dóm eisini, alt eftir hvat promillan vísir seg at vera.

Starvsfólk
TIL BURGER KING Í SMS

FULLA TÍÐ OG AFTANÁ SKÚLATÍÐ

Søkt verður eftir fólki M/K sum er 18 ár ella eldri, til fulltíðar arbeiði, og eftir fólki sum er 16 ár ella eldri til arbeiði aftaná skúlatíð. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar tær væl at arbeiða har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir, og eftir hetta kanst tú gerast eitt av álitisstarvsfólkum okkara. Vit gleða okkum til at hoyra frá tær...

SEND UMSÓKNINA TIL

Burger King, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn. Ella far inn á sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal.

